ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Til íslendsku meistararnar

Eftir at føroyskir fótbóltsleikarar í nøkur ár hava roynt seg í Íslandi, tykist tað nú vera hondbólturin, sum dregur føroyingar norðureftir

Týskvøldið varð Gunnleyg Berg ringd upp av Jacob Jónsson, sum beyð henni at koma til Islands at royna seg

JÁKUP MØRK

Í øllum førum røkist nú møguleiki fyri, at tvær av fremstu kvinnuligu hondbóltsleikarum okkara nú fáa høvi at royna seg íslendska meistaraliðnum, ÍBV.

Tað eru tær báðar, Anniku Ljósstein úr Stjørnuni og Gunnleyg Berg úr Neistanum, sum hava fingið í boði at royna seg hjá felagnum, og báðar hava tær tikið av tilboðnum.

Beint eftir døgurða í gjár, fríggjadagin, skuldu tær báðar fara við íslandsflogfarinum, og longu í gjárkvøldi stóð fyrsti dysturin á skránni, við tað at ÍBV í løtuni er á venjingarlegu í Íslandi. Eisini verður ein dystur í kvøld, áðrenn tær í morgin fara til Vestmannaeyjar at hyggja nærri at umstøðum felagsins.

Skjót avgerð

Hvussu stórur møguleikin er fyri einum verðandi uppihaldi, tykist ilt at meta um í løtuni, men í øllum førum vóru tær báðar hondbóltsgenturnar sera spentar, tá vit hóskvøldið skiftu orð við tær.

Gunnleyg greiðir frá, at fyrrverandi kyndilsleikarin, og núverandi tjaldursvenjarin, Jacob Jónsson, týskvøldið setti seg í samband við tær, og eftir at hava umhugsað støðuna, tók hon av tilboðnum.

Sum hon hevur skilt á lagnum, so koma teir báðir venjingardystirnir at gera av, hvørt tær fáa í boði at verða verandi í Íslandi. Gongst somikið væl, at hetta kemur upp á tal, verður talan allarhelst um eitt slag av hálvtíðar sáttmála, har talan verður um at arbeiða nakrar fáar tímar um dagin, meðan restin so verður nýtt til hvíld og venjing.

Júst hvussu støðið á Íslendskum kvinnuhondbólti er, dugdi Gunnleyg ikki at meta um, men sum hon hevur skilt á lagnum, kundi tey bestu føroysku liðini helst staðið seg í bestu deildini.

Serstakt høvi

Í mun til Gunnleyg, hevur Annika áður roynt at tikist við íslendsk kvinnulið. Hetta var undan kappingarársbyrjan í fjør, tá Stjørnan var á venjingarlegu í Íslandi.

Annika greiðir frá, at tær tá royndu seg móti onkrum av oddaliðunum í Íslendsku kappingini, og hóast tær í fyrsta dystinum fingu av at vita, so hylnaðist venjingarlegan sum heild væl, og úrslitaliga gekst eisini á eini heilt góðari leið móti øðrum íslendskum liðum.

Hóast hon tykist sera spent um brádliga ískomna møguleikan í Íslandi, so leggur Annika afturat, at um talan verður um sáttmála, so er tað samstundis við sorgblídni, at hon sigur farvæl við liðfelagarnar í Stjørnuni.

Heldur enn fegin vil liðskiparin hjá klaksvíksgentunum sleppa at verja FM-heitið, sum liðið vann í fjør, men sum hon sigur, so er ikki vist, at eitt slíkt høvi býðst aftur. Hinvegin vísur hon tó eisini á, at enn er einki avgjørt, og verður hon vigað ov løtt av íslendingum, so verður sjálvandi aftur við Stjørnuni komandi kappingarár.

Umframt at hava roynt seg í Stjørnuni, hevur Annika eisini spælt í næstbestu donsku deildini. Tilvildin vil, at navnið á danska felagnum var »Stjernen«.

Eins og Gunnleyg, er Annika Ljósstein eisini boðin til Íslands, og í gjár skuldu tær leika venjingardyst við ÍBV

AGF venjarin er í øðini

Fyri at lætta trýstið á spælarunum, stoytti venjarin hjá Óla Johannesen og teimum hóskvøldið eina stóra pøs omanyvir leiðsluna í felagnum

AGF við Óla Johannesen í hópinum fer í morgin norður til Aalborg. Hýrurin er einki serligur, og sjálvsálitið er neyvan av tí besta. AGF hevur tapt fýra teir síðstu landskappingardystirnar, og botnurin kennist alt nærri.

Ove Christiansen hevur síðani summarsteðgin verið venjari í AGF. Har hevur verið nógvur turbulensur, tí fíggjarliga støðan hevur verið so vánalig, og tí onkrir av spælarunum hava skikkað sær so illa – summir á vøllinum og onkur uttanfyri vøllin.

Venjarin hevur ikki fjalt yvir, at hann hevur verið misnøgdur við, at leiðslan í felagnum hevur verið so ússalig.

Aftur hóskvøldið var Ove Christiansen í donsku fjølmiðlunum og beit frá sær. Hann helt, at nú var nóg mikið grenjað í AGF. Nú ráddi um at seta seg saman, at tosa viðurskiftini ígjøgnum og at taka tær avgerðirnar, sum eru neyðugar, um felagið skal fóta sær og arbeiðsumstøðurnar skulu gerast, sum tær mugu vera, um nakað skal spyrjast burturúr.

Í donsku pressuni verður sagt, at venjarin er snildur. Hann nýtir høvi at snara eygunum frá spælarunum, sum nógvir eru lítið royndir, og yvir á leiðsluna.

Aftur og fram

Í týsdagsblaðnum søgdu vit, at Óli Johannesen hevði verið á liðnum frá fyrsta bríksli síðsta vikuskifti. Tíðindini høvdu vit frá einari heimasíðu á alnetinum, sum vanliga er sera álítandi. Men hesa ferð vóru tíðindini ikki røtt á heimasíðuni, sum hevði Óla Johannesen ímillum teir fyrstu ellivu og á einum miðvallarplássi.

Seinni í vikuni hava vit frætt, at Óli varð settur inn í verjuna í 38. minutti. Tað komst av útvísingini av Ken Martin ímóti Silkeborg. Tá var ein stórur hálvur tími farin. Útvísingin hevði við sær, at venjarin tók ein miðvallara út og setti Óla Johannesen í miðverjuna.

AGF er fíggjarliga í tungum sjógvi. Tí royna teir at selja spælarar. Hesa seinastu vikuna hava tveir verið í Onglandi og royndarvant. Talan er um miðverjan Dennis Siim og verjuspælaran John Jensen. Teir hava verið í 1. deildarfelagnum Barnsley. Enn er eingin sáttmáli komin burturúr.

Mikudagin í hesi vikuni kom spæliloyvið hjá brasiliumanninum Ricardo Silva til AGF. Felagið hevur fyribils gjørt leigusáttmála við álopsmannin.

JH

Nú má røkka ella støkka

Um B68 við trimum fyrrverandi HB monnum skal halda tørn um FM møguleikan, so mugu teir vinna, tá oddaliðið úr HB vitjar á Svangaskarði

Í morgin hevur B68 knívin á barkanum. Um teir vinna, tá HB kemur á vitjan, verður framvegis lív í vónini at vinna meistaraskapin. Um HB vinnur, ella um tað verður javnleikur, so er vónin fyri FM heitinum horvin á Toftum. Í B68 rokna tey – við úrslitunum seinastu tíðina í huga – ikki við, at HB fer at missa stig í Gundadali ímóti B36 og í Sumba.

Í B68 rokna taka teir ein dyst í senn. Tann ímóti HB verður strevin, og tað verður heldur ikki á nakran hátt lætt tær báðu næstu ferðirnar, tá teir skulu til Vágs og fáa vitjan av GÍ.

Tað kom illa við hjá B68, at teir taptu 3–0 í Runavík. Teir halda ikki, at teir høvdu marginalirnar við sær, og teir halda ikki, at teir vístu tann hugburðin, sum skal til, um dystirnir skulu vinnast ímóti góðu liðunum. Hetta hava teir tosað um á Svangaskarði, meðan teir hava savnað hugsanirnar og orkuna um stóru avbjóðingina, sum tað altíð er fyri eitt so lítið felag at fáa vitjan av HB.

Øssur Jacobsen var leikbannaður í Runavík. Hann er tøkur aftur, og eingin annar er leikbannaður. Eingin toftamaður er skaðaplágaður.

Merkisvert er tað, at HBararnir fara at hitta fleiri kendar menn á Svangaskarði. Her verður hugsað um B68 venjaran, Jóannes Jakobsen, sum hevur verið venjari í HB í tvey ár, og sum hevur spælt á besta liðnum í fimtan ár. Her verður eisini hugsað um Jan C. Dam, sum hevur spælt í HB í trettan ár, og um Súna Fríða Johannesen, sum var í HB í fjør og í fyrraárið.

Lykladysturin

Longu undan GÍ dystinum tosaðu teir í HB um, at lykladysturin, sum fór at hava alstóran týdning fyri, hvør skal vinna FM, fór at verða tann ímóti B68, og tað halda teir framvegis í HB. Spenningurin í HB húsinum er stórur, og tað verður roknað við, at nógvir HB stuðlar í morgin fara á Svangaskarð.

Eingin HBari er leikbannaður. Rói Árting fekk ein snudd undir síðuna og noyddist tískil tíðliga út ímóti GÍ. Rói hevur vant eitt sindur í vikuni, og hann verður við í hópinum í morgin. Rúni Nolsøe fekk undir venjing mikukvøldið ein brest í skirvisliga knæið, men teir rokna við, at liðformaðurin verður tøkur í morgin.

HB betri hagtøl

Tað var púra óvæntað, tá B68 fyrr í summar vann 4–3 í Gundadali. Heimaliðið hevði leikliga yvirvág, men í HB ásanna teir, at B68 var effektivt, og toftamenn tóku av, tá møguleikin kom til teirra.

Tapið ímóti B68 4. juni var hjá nógv teimum flestu HB spælarunum tað fyrsta nakrantíð. B68 vann FM í 1992. Tá varð HB sent av Svangaskarði við 1–0 tapi. Síðani tá hevur B68 ongantíð vunnið heimadystirnar ímóti HB. Í 1993 og í 1994 endaðu dystirnir javnir – ávikavíst 1–1 og 2–2. Og aftur í 1998 var javnleikur – tá kom einki mál. Hini árini hevur HB vunnið. Í 1995 2–1, í 1996 4–3, í 1997 5–2, og í fjør vunnu teir ikki minni enn 5–1.

JH



Skal B68 varveita FM-møguleikan, er alneyðugt við eini endurtøku av sigrinum á HB

VB savnar seg um Sarpigerði

Vágbingar, sum hava stórt sjálvsálit, vóna, at B68 hjálpir teimum, men VB venjarin kann ikki hugsa um annað enn dystin ímóti GÍ



Hóast vágbingar sjálvsagt vóna, at toftamenn fera okkurt við HB, so røðður fyrst og fremst hjá VB um at vinna dystin í gøtu

Vágbingar fara í morgin á vøllin í Gøtu bara við einum í huganum. Tað er at vinna øll stigini. Tað er upplagt at ímynda sær, at teir í VB eru sera spentir at frætta, hvussu tað fer at ganga á Toftum:

– Vit vóna, at B68 fer at megna í hvussu so er javnleik. Men vit kunnu ikki hugsa um nakað annað, meðan vit spæla, enn at vinna. Um vit søpla stig burtur, so verður tað líka mikið, um B68 fær stig frá HB.

Tað er VB venjarin, Krzysztof Popczynski, sum vit hava í telefonini:

– Eg síggi soleiðis uppá tað, at um HB vinnur á Toftum í morgin, so verða teir púra víst meistarar. Teir fara ikki at missa stig til B36 ella Sumba. Um tað verður javnleikur á Toftum, ella um B68 vinnur, so verður alt púra opið. Tá verður tað týdningarmikið hjá okkum einki at hava søplað burtur í Gøtu. Tí mugu vit vinna, og tað ætla vit okkum at gera.

Hjá VB er eingin spælari skaddur, men Predrag Zivkovic er leikbannaður:

– Vit hava fjúrtan spælarar, sum eru kvalifiseraðir til 1. deild, og allir eru spentir eftir at sleppa upp í part. Tað er sera positivt, heldur spælandi VB venjarin.

Bartal leikbannaður

GÍ fekk ein orduligan upp á kassan á útivølli ímóti HB. Men veteranurin Pauli Jarnskor tvíheldur um, at hugurin er framvegis góður, sjálvt um tað er langt útliðið:

– Veðrið at venja hevur verið so framúr gott, og tað er hugaligt. Eftir at teir hjá HB heldur bíliga fekk tvey tey fyrstu málini, datt liðið hjá okkum sundur, og so var einki at gera. Sunnudagin eiga vit at megna nógv meiri.

Hjá GÍ er Jóan Petur Olsen, sum var skaddur síðsta sunnudag, tøkur aftur, og tað er Helgi L. Petersen eisini. Hann var leikbannaður ímóti HB. Hesa ferð er Bartal Eliasen leikbannaður.

GÍ omaná

Tað verður ofta tikið til, at VB altíð stendur seg væl í Gøtu. Hagtølini siga, at nógvu tey seinnu árini hevur GÍ fyri tað mesta verið omaná, tá teir hava havt vitjan av VB.

VB vann 2–0 í Gøtu í 1998, men síðani skulu vit aftur til 1992 fyri at finna ein annan VB sigur. Tá var úrslitið 1–2. GÍ vann í fjør 3–1, í 1997 4–1, 1996 1–0, í 1995 3–0 á Sumba/VB og í 1993 1–0 (VB var í 2. deild í 1994).

At tað verður tikið til, at VB stendur seg væl í Gøtu stavar frá tíðini kring 1990. Í 1988 vann VB 1–0, í 1989 vunnu teir 3–1, í 1990 var 1–1, í 1991 2–2 og so vunnu vágbingar – sum nevnt omanfyri – 2–1 í 1992.

JH